## Døpur arbeiðsloysisútlit

Arbeiðsloysið í Danmark er veksandi. Í desember mistu 5.900 fólk arbeiðið, so um ársskiftið vóru 57.900 fólk skrásett sum arbeiðsleys. Tað svarar til 2,1 prosent av arbeiðsmegini, og nógvir búskaparfrøðingar vænta, at tað verður meiri enn tvífaldað í hesum árinum. Jes Asmussen, búskapatfrøðingur hjá Handelsbanken, sigur við Ritzau, at talið á arbeiðsleysum dønum mkann fara heilt upp í 140.000 tíðliga í 2010. Aðrir búskaparfrøðingar halda tó ikki, at talið verður so stórt.



# Ójavnar sparingar

**Mentamálaráðið er avsporað í málinum um at fremja sparingar á skúlaøkinum, sum inniber at fylla flokshølini við upp til 26 næmingum í hvørjum flokki. Sparingarnar raka meinari tey skúlaøki, ið frammanundan royna at rationaliserað sín rakstur, enn onnur øki í landinum**

FÓLKASKÚLIN
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Formaðurin í Føroya Lærarafelag, Magnus Tausen, er sera ónøgdur við tær sparingar, sum Mentamálaráðið hevur sett út í kortið. Nýggja innskrivingarskipanin hevur við sær, at talið á næmingum í hvørjum flokki fer upp um teir 24 næmingarnar, sum Fólkaskúlalógin ásetur sum loft í hvørjum flokki.

- Mentamálaráðið, sum umsitur fólkaskúlan, er rættiliga avsporað í hesum málinum. Ráðið velur við hesi avgerðini at gera sparingar á teimum skúlum, sum frammanundan koyra við tí mesta rationella rakstrinum. Og tað er ikki rætt, sigur Magnus Tausen.



*Við spariætlanunum hjá Mentamálaráðnum, verða tað einans stóru skúlarnir í landinum, ið verða raktir, og tað er ikki rætt, heldur formaðurin í Føroya Lærarafelag, Magnus Tausen.*
*Savnsmynd*

Formaðurin í Føroya Lærarafelag vísir á, at við hesi sparingini, verða tað einans skúlarnir í Havn og Klaksvík, ið koma at líða undir, við tað at næmingatalið verður trýst upp á 26 næmingar í hvørjum flokki. Smærru skúlarnir úti um landið verða ikki raktir á sama hátt, tí har eru flokkarnir ikki so stórir.

- Vit saknað at vera eftirspurd í hesum málinum. Hendan avgerðin er ikki í tráð við fólkaskúlalógina, sum áleggur skúlunum ikki at hava fleiri enn 24 næmingar í hvørjum flokki.

Hann leggur afturat, at júst í ár, við tað at skúlin við Løgmannabreyt í Havn er tikin í brúk, er møguleiki fyri at fáa luft í trongu flokshølunum. Nú er møguleiki fyri at fáa næmingatalið niður á 15-18 næmingar í hvønn flokk, sum eisini verður mett at vera tað optimala fyri lærarar og næmingar. Í løtuni eru 220 næmingar í 1. flokki býttir í 13 flokkar í Tórshavnar kommunu. Í uppskotinum hjá Mentamálaráðnum, skulu einstakir næmingar flytast úr skúlum, tey hava ynskt at gingið í, fyri at fylla ein flokk í øðrum skúla. Í uppskotinum eru tað bert tríggir flokkar, ið halda seg undir 24 næmingar. Sostatt verður lógin brotin í fýra førum, har næmingatalið fer upp á 25 og 26 næmingar í hvørjum flokki.

Harafturat er tað ógreitt fyri Føroya Lærarafelag hvør raðfylgjan er í hesum málinum, nú játtanir til skúlar vera gjørdar út frá innskrivingini, og ikki eftir tí, sum krevst fyri at reka ein skúla.

- Nú fara vit at fylgja við tølunum fyri innskrivingina av næmingum, og vit fara at fylgja hesum málinum upp. Hetta er eitt álvarsligt mál, sum ikki bøtir uppá støðuna hjá hvørki næmingum ella lærarum, sigur Magnus Tausen, formaður í Lærarafelagnum.

Í næstum fer Lærarafelagið at samskifta við Mentamálaráðið um málið. Lærarafelagið hevur saknað at verið eftirspurt í hesum spariætlanum, og var tað rætt, var hetta málið lagt fyri eitt fólkaskúlaráð, áðrenn tað kom so langt.

- Vit fara ikki at sleppa hesum málinum, sum vit meta vera sera týdningarmikið. Hetta ørkymlar bæði foreldur og lærarar, sigur Magnus Tausen.

## Torradagar í Klaksvík

**Aftur í ár bjóðar Klaksvíkar kommuna til Torradagar í býnum. Við Torradøgum verður fokus sett á ymisk evni í samband við fiskivinnu, og verður tað gjørt við ymiskum viðkomandi fyrilestrum**

MENTAN
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Vika nummar níggju í ár er sett av til at varpa ljós á føroyska fiskivinnu í Klaksvík. Dagarnir verða róptir Torradagar, eftir heiti frá gomlu tíðarrokningini. Torri er eftir fyrstu tendring í álmanakkanum og áðrenn næstu tendring. Sagt verður, at fiskurin hetta tíðarskeiðið er væl fyri, og kemur nærri landgrunninum at gýta. Hesa tíðina verður fiskurin vanliga øðrvísi tilgjørdur, ofta fyltur við rogni og livur.

Hetta navnið hava klaksvíkingar valt at rópa viku 9 í ár, og samstundis at nýta høvi til at varpa ljós á fiskivinnuna í Føroyum. Á skránna eru tríggir fyrilestrar settir, tann fyrsti undir heitinum Á flot við teldu, har Knud Simonsen havfrøðingur fer at greiða frá um nýliga mentu HÚK skipanina. Annar fyrilestur eitur Virðisøkt veiða og vinningur, har Hóraldur Joensen, granskingarleiðari á Fróðskaparsetri Føroya, fer at greiða frá hvussu vit gagnnýta tilfeingi úr sjónum, sum lítið verður gjørt við. Triðja fyrilesturinum stendur Pál Weihe fyri, og fer hann at greiða frá um grind sum mannaføði.

Enn er skráin fyri Torradagarnar ikki fullfíggjað, men Klaksvíkar kommuna upplýsir, at heilsukafe, heilsurenning, torrasvimjing og torramatskrá eisini vera á skránni.

# SEV undir eitt tak

**Ætlanir eru frammi um at savna SEV virkið undir einum og sama taki. Byggjast skal upp í verandi høvuðsbygning, og íløgan er leysliga mett at kosta 60-70 milliónir**

Leiðslan í SEV ynskir at savna virksemið hjá fyritøkuni undir einum taki. Tað uppskotið varð lagt fram á seinasta aðalfundi hjá fyritøkuni, og lagt er upp til at fyritøkan skal savnast í verandi bygningi á Landavegnum í Havn, har fyritøkan eigur eitt stórt óbygt grundøki oman fyri núverandi bygning. Væntandi verða liðugtgjørdu hølini dupult so stór.

Hákun Djurhuus, stjóri í SEV, sigur at leysliga er nýbyggingin mett at kosta 60-70 milliónir krónur, men at neyvari útrokningar skulu til fyri endaliga at staðfesta kostnaðin.

- Hetta árið fer við at leggja ætlanir um bygginina, og vónandi verður arbeiðið liðugt í 2012, sigur stjórin fyri SEV.

Í samband við nýbyggingina á Landavegnum, skal gamli SEV bygningurin í Gundadali seljast. Sjálvur bygningurin er 1000 fermetrar til støddar, og grundøkið telur tilsamans 7000 fermetrar. Í Gundadali starvast fólk hjá SEV, ið fáast við tøkni í fyritøkuni.

- Enn er hetta ein skitsuætlan, men í næstum fara vit at lýsa hetta uppskotið betri, og royna at fáa viðurskiftini uppá pláss, sigur Hákun Djurhuus, stjóri á SEV.

